## Ráðgevarafelagið og FRI bjóða skeið í

# Byggileiðslu og eftirlit/ fíggjarlig ábyrgd og umprojektering

Skeiðið er býtt upp soleiðis, at ein partur verður fyrrapart og ein seinnapart. Endamálið við skeiðum er at veita byggileiðarum og eftirlitsfólkum praktisk og løgfrøðiliga nýtilig amboð til handfaring av arbeiðstakarum, byggiharrum og øðrum. Undirvísari verður leiðandi løgfrøðingur Lars Hauberg, ALECTIA A/S, sum hevur drúgvar royndir í evninum.

## Kunning um skeiði:

Skeiði verður **fríggjadagin 10. mars 2017 á Hotel Føroyum frá kl. 9.00 til 16.00**

Tilmelding fer fram umvegis heimasíðuna hjá Vinnuhúsinum www.industry.fo. Tilmeldingin er bindandi og gjaldast skal frammanundan. Peningurin verður ikki afturgoldin um luttakari ikki fær møtt, til ber tó at lata plássið til onkran annan. Tilmeldingarfreistin er 7. mars 2017.

Kostnaður fyri limir í RGF ella FRI kr. 2.500 og kr. 5.000 fyri ikki limir.

## Skrá:

### Fyrri partur: kl. 9.00-12.00

**“Praktiskur byggirættur í eftirlit og byggileiðslu”**

Yvirskipaða endamálið við skeiðinum er at veita byggileiðarum og eftirlitsfólkum praktisk og løgfrøðiliga nýtilig amboð til handfaring av arbeiðstakarum, byggiharrum og øðrum.

Skeiðið tekur støðið í AB92 og ABR89 og gerðarættardómum á økinum.

### Miðmáli : kl. 12.00-13.00

### Seinni partur: kl. 13.00-16.00

**”Fíggjarábyrgd og umprojektering”**

Í ráðgevaravinnuni er eitt rák har byggiharrin áleggur ráðgevaranum ábyrgd at halda ásettar fíggjarkarmar. Sum liður í hesum, átekur ráðgevarin sær skylduna at broyta verkætlanina uttan kostnað, um fíggjarkarmurin ikki verður hildin.

Fíggjarábyrgd og treytirnar um kostnaðarfríða broytingar av verkætlanum økir munandi um fíggjarliga váðan fyri ráðgevan – serstakliga tá fíggjarkarmarnir eru trongir.

Á skeiðiðnum verður ein praktisk gjøgnumgongd av rættindum og skyldum hjá bæði ráðgevaranum og byggiharranum í mun til fíggjarætlan og umprojektering.

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

Foreningen af
Rådgivende Ingeniører
FRI